# Løgtingstimir og landsstyrismenn – tveir lønarfríar mánaðir árliga

**Petur Skeel Skarðsá var annar røðarin á pallin, tá 1. mai varð hildin á Vaglinum á Havn. Petur Skeel Skarðsá flutti fram røðu sína, sum umboð fyri verkafólkið.**

1. MAJ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

– Tað er ein heiður at sleppa at standa her í dag, legði Petur Skeel Skarðsá fyri við at siga, og helt áfram og segði, at tað er á hesum degi, at vit eiga at minnast tey við virðing, sum hava vunnið arbeiðaranum tey rættindi, teir hava í dag.

Petur Skeel Skarðsá vísti á, at hóast umstøðurnar hjá arbeiðarunum kring knøttin eru ymiskar, so er felagsnevnarin fyri teir allar, at tilverugrundarlagið er tengt at tí hendur og armar skapa.

Tá ið hetta var sagt, gjørdist røðan meiri politisk. Petur Skeel Skarðsá tosaði søk verkamansins, og tað hoyrdist eisini aftur.

– Politikkararnir geva við aðrari hondini, og taka tvífalt aftur við hinari, samstundis meðan gjógvin millum tey tímaløntu og tey, sum eru betur lønt, bara veksur, vóru nøkur av sjónarmiðunum hjá Peturi Skeel Skarðsá.

Í røðuni varð eisini staðfest, at dagsins ungdómur ikki sá nakra framtíð í ófaklærda arbeiðsmarknaðinum, tí í dag krevja og vænta øll, at tú fært teir eina útbúgving. Men til hetta spurdi Petur, hvussu tað so fór at enda, um ongin tímdi at arbeiða á fiskavirkjunum, tí tey hava so sanniliga týdning fyri útflutningsvinnuna.

**Visjón ella hvørvisjón**

Í øllum trimum talunum, sum vóru hildnar á Vaglinum í gjár, varð nomið við visión 2015. Petur Skeel Skarðsá segði, at vit mugu føra skilagóðan politik hesum viðvíkjandi, tí orð í sær sjálvum skapa onga visiónir. - Fólkið má skilja visiónstosið, og arbeiðarin má vera partur av dagsskránni, og fáa somu sømdir sum tey alment løntu, tí annars er tað skjótt, at talan verður um eina hvørvisjón heldur enn visión 2015, segði Petur Skeels Skarðsá.

Í endanum á røðu sínari skeyt Petur Skeel Skarðsá upp, at løgtingslimirnir og landsstýrismennirnir áttu at havttveir lønarfríar mánaðir árliga, tí tað hevði verið nakað, sum veruliga sást aftur í landskassanum.



*Petur Skeel Skarðsá endaði røðu sina við at skjóta upp at løgtingstimir og landsstyrismenn hava tveir lønarfríar mánaðir árliga*

# Vælsmakkandi "beef-dogs" úr Kroatia

**Zoran úr Kroatia hevur búð í Føroyum í fimm ár. Fyri 5 mánaðum síðani keypti hann ein pylsuvogn, sum hann hevur opnan hvønn dag**

PYLSUVOGNUR
*Heini S Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Pylsuvognurin stendur uttanfyri ítróttarhøllina í Runavík. Maðurin, sum stendur innanfyri er fryntligur og fyrikomandi. Tað eru eiginleikar, sum eru góðir at hava, tá ið tú arbeiðir innan søluvinnuna. Hann hevur eisini lætt við at selja tíðindamonnunum hjá Sosialinum pylsur.

Maðurin, sum eigur og rekur pylsuvognin, eitur Zoran. Hann og hansara familja komu fyri 5 árum síðani sum flóttafólk til Føroya. Zoran og familjan hjá honum eru úr Kroatia. Tey vilja fegin verða verandi í Føroyum, tí at hann hevur júst keypt sær hús, nýggjan bil og pylsuvogn, men tað er trupult at fáa uppihaldsloyvi.

Zoran hevur arbeitt á Bakkafrost, og konan og børnini arbeiða á Lynfrost. Fyri fimm mánaðum síðani keypti hann pylsuvognin, har hann nú arbeiðir burturav. Hann hevur fingið loyvi frá Runavíkar kommunu at hava pylsuvognin standandi við ítróttarhøllina í Runavík, við rundkoyringina á Skipanesi og við ítróttarøki á Skála.

Hann hevur opið frá 8 til umleið 19 hvønn dag. Onkuntíð má hann lata aftur orsakað av vindinum. Hann selur javnt nógv. Um morgunin eru tað serliga skúlanæmingar, sum keypa, og seinnapartin eru tað ítróttarfólkini, sum keypa aftaná venjing.

Pylsurnar, sum vit hava bílagt eru nú lidnar. Tað er ein sokallaður "Beef-dog", og ikki kann sigast annað enn, at hann smakkaði sera væl.



*Amy D. Streymoy keypir frá Zoran*

## Zoran er sera blíður

Nakrar gentur koma niðan til pylsuvognin og bíleggja sær okkurt heitt at eta. Tær ganga í Runavíkar Skúla. Amy D. Streymoy er ein av gentunum, sum onkuntíð keypir frá pylsuvogninum hjá Zoran. – Tað er deiligt at kunna keypa her í fríkorterinum. Tað eru nógvir næmingar, sum nýta møguleikan at keypa sær okkurt at eta her. Tað er mest í skúlatíð, at eg keypi her, men eisini onkuntíð aftaná venjing, sigur Amy.

Zoran er sera blíður, og tað er deiligt, at hann hevur opnað pylsuvognin, sigur Amy D. Streymoy.